

## Eigaraíbúð á Niðaragøtu 17, Hoyvík til sølu

Ognin matr.nr. 1ym, Niðaragøta, Hoyvík er til sølu um hóskandi boð fæst. Íbúðin er 87 m2 til støðdar og liggur sera væl fyri við góðum útsýni og í barnavinarligum umhvørvi. Parkeringsumstøðurnar eru góðar.

Íbúðin er í tveimum hæddum. Í niðaru hæddini er gongd, vaskirúm, wc, køkur og stova. Í ovaru hæddini er gongd, baðirúm, sovirúm, tvey kømur, og eitt goymslurúm.

Í íbúðini er fjarhiti, umframt felags antennuskipan. Íbúðin er limur í eigarafelagnum "Inni á Gøtu".

Áhugaði kunnu venda sær til:

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4 · 100 Tórshavn
Tlf. 311260, fax. 311261
e-mail: ge@lawfirm. fo

Tormóður Djurhuus, adv., Jógvan Páll Lassen, adv., Petur Even Djurhuus, adv., Jógvan E. Ellefsen, adv., Anna Dam, adv., Ingi Højgaard, adv.

## Feriuavloysarar til P/F Auto

Søkt verður eftir feriuavloysarum til P/F Auto.

**Ring 311234**

Auto
3-1-1-2-3-4

## Kavaraskúli

FAROE DIVE.fo

Grundskeið byrjar 22. juni
1. hjálparskeið 21. juni

**Ring 218929**



PADI
w w w . f a r o e d i v e . f o

## Alv skúlin við Áir

**430 Hvalvík · Skúlin tlf. 422137,**
**skúlaleiðarin tlf. 422052 · fart. 224521**
**fax 422532 · e-mail: alvskul@post.olivant.fo**



### byrjar nýtt skúlaár mánadagin 14. august 2006.

Alv skúlin er fyri vaksin við skerdum vinnuevnum t.d. aftaná vanlukku, viðføddum breki ella av sosialum orsøkum.

Næmingar kunnu taka prógv til fráfaringarroynd fólkaskúlans og FHS prógv.

Skúlin er kostskúli og møguleiki er at búgva á kostdeildini.

Skúlin strembar eftir at menna næmingarnar og sjálvsálit teirra, so at teir kunnu koma aftur í tær avbjóðingar, sum samfelagið býður, og at teir har kunnu kenna seg væl.

Alt virksemi skúlans viðvíkjandi teim ymsu næmingunum er vent móti føroyska samfelagnum við tí stavnhaldi, at næmingarnir koma at eiga eitt vinnustað har.

ALV-skúlin hevur mangar og drúgvar royndir við endurútbúgving, og tað er út frá hesum fyritreytum, tað verður farið til verka.

Áhugað kunnu venda sær til skúlan (sí omanfyri nevndu adressu) og fáa tilmeldingarblað.

Næmingar, ið Almannastovan ávísir, koma í fyrsta lagi inn á skúlan. Nærri fæst at vita hesum viðvíkjandi við at venda sær til Marjuna Berg, deildarleiðara, tlf. 353570.

Tilmeldingarfreistin er mánadagin 30. juni 2006.

**Alv-skúlin við Áir**
Mai-Britt Holm Andersen
skúlaleiðari

## Gloymd klæðir í Argja skúla

Klæðir o.a., sum er gloymt í Argja skúla hetta skúlaárið, liggur frammi í miðhøllini mánadagin 20. juni og týsdagin 21. juni, báðar dagarnar til kl. 17.00.

Tað, ið ikki verður avheintað, verður latið Bláa Krossi.

**Argja skúli**

## Jørð í Tórshavn



Til sølu er eitt óbygt jarðarstykki til víddar 5.235 $m^2$.

Talan er um eina trøð, ið hevur heitið matr. nr. 658e, Tórshavn, og liggur Yviri við Strond.

Sambært byggisamtyktini er talan um fríøki.

Áhugað verða biðin um at venda sær til Advokatskrivstovuna, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, att. Aksel V. Johannesen, adv.ft., e-mail avj@jura.fo ella Birnu Joensen, e-mail bij@jura.fo

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Pouslen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Tlf. 311145 · Telefax 31 15 25
e-mail: jura@jura.fo



## Feriuavloysari

Eitt starv sum avloysari fyri bilførara á Viðarnesi er leyst at søkja skjótast til ber.

**Arbeiðsøki:**
Bilførari, koyra tangabil.

**Krøv:**
Stóra koyrikortið. Umsøkjarar við royndum hava fyrimun.

**Arbeiðsstað:**
Tórshavn.

**Løn:**
Smb. sáttmála við Havnar Arbeiðsmannafelag.

**Byrja:**
Skjótast til ber.

**Tíðarskeið:**
Summarið 2006, men møguleiki fyri avloysing onnur tíðarskeið eisini áhugaverd.

Meiri kann fáast at vita um starvið frá Andrias Jacobsen á tlf. 347400, lokal 430.

Shell